gult cyan magenta svart

Frístaður hjá børnum og ungum

- Á Margarinfabrikkini sleppa børn at vera seg sjálv. Vit góðtaka tey sum tey eru, uttan mun til, hvat tey gera ella hava gjørt. Men tað er ikki altíð so tespiligt at hoyra tey siga frá, hvat tey hava upplivað ella verið vitni, sigur Lise Larsen, sum arbeiðir við børnum og ungum á Margarinfabrikkini í Havn

Lise Larsen: – Børn og ung kunnu vera óbindandi saman, men hava tey hug, kunnu tey tosa við vaksið fólk

Mynd: Jens K. Vang

VIRKISHÚS
Turið Kjølbro

Har koma øll børn, úr øllum heraðshornum í býnum, úr ymiskum heimum, og við ymiskum fortreytum. Børn, sum hava nógv frítiðaráhugamál. Børn, hvørs foreldur arbeiða allan dagin. Børn, sum eru nógv einsamøll. Eini 70 børn og ung hvønn dag, seinnapartar og um kvøldið. Gamla margarinfabrikkin í Havn er frístaður hjá hesum børnum. Og tú hevur ikki verið har leingi til tað ber til at gera tær eina mynd av, hvat rørir seg millum tey, hvørjum tey eru upptikin av og hvat tey tosa um. Eitt barometur, sum sigur, hvussu børn í Føroyum hava tað við seg sjálvi, heima og í skúla. Nógv prutlar undir lokinum, skilst.

Síðani seinasta heyst hevur Lise Larsen arbeitt á Margarinfabrikkini. Og í november fór hon undir tveir gentubólkar, sum koma saman mikudag.

– Endamálið við at savna genturnar saman er upplýsing um nógv ymisk viðurskifti og fyribyrging. Ikki bara um viðurskifti tey skulu vara seg fyri, men eisini um ymiskt, sum gott er at vita. Í skúlanum og heima fáa tey nógv at vita, men eftir øllum at dømu ikki nóg mikið., sigur Lise Larsen.

Nógv kemur fram

Tann eini bólkurin er fyri gentur í aldrinum 8 til 13 ár, og hin er fyri gentur í aldrinum 13 ár og eldri.

– Í bólkinum tosa genturnar um ymiskt, tær hava hug til. Tær eru ógvuliga ósmædnar og opnar um persónlig viðurskifti. Tað verður mangan ógvuliga kensluborið og við hvørt velja børnini at fara út, tá okkurt evni gongur teimum ov nær. Onkur av gentunum hevur mist annað av foreldrunum, hjá fleiri eru foreldrini farin hvør til sítt, hjá øðrum drekka for-eldrini, onkur verður kanska sligin heima og so framvegis. Alt kemur fram í bólkinum og genturnar vita, at alt sum verður sagt í bólkinum, fer ikki út. Hinvegin um spyrja vit barnið, um vit skulu gera nakað, torir tað ikki. Men tey hava brúk fyri at fortelja tað. Vit góðtaka tey sum tey eru og eru góð við tey, uttan mun til, hvat tey gera ella hava gjørt. Men tað er ikki altíð so tespiligt at hoyra tey siga frá, hvat tey hava upplivað ella verið vitni til heima ella í býnum, sigur Lise Lar-sen.

Hóast Lise Larsen leggur doyin á, at tað eru heilt vanlig børn, sum koma á Margarinfabrikkina og í gentubólkarnar, skerst ikki burtur, at ein partur eru børn og ung, sum ikki altíð hava tað so gott og sum hava upplivað ymiskt, tey áttu at verðið spard fyri.

– Tey, sum koma frá vanligum heimum, standa eitt sindur fyri seg sjálvi og gera beinanvegin vart við seg, um eitthvørt hendir, sum tær ikki finna seg í. Tað er gott at hava hesi børnini ímillum, tí fara nøkur børn út um mark antin við at siga eitthvørt ella við at gera okkurt, so eru tað hesi børnini sum hála í tey. Tey børnini, sum ikki hava tað gott, eru sokallaðir symptomberarar um eitt ella annað, sum ikki er so gott.

Hevur tú varugan av, at tað eru nógv børn sum ikki hava tað gott?

– Tað havi eg. Eg vil eisini siga tað soleiðis, at eg havi varugan av, at tað eru nógv foreldur, sum ikki hava tað gott. Nógv av børnunum hava tað ikki gott í skúlanum. Og vit hoyra eisini frá børnunum, hvat fer fram í skúlanum. Nógv rættiliga álvarsamt. Í fleiri førum tekur skúlastjórin ikki pedagogisku ábyrgdina.

Nógv virksemi

Lise Larsen leggur stóran dent á, at genturnar verða upplýstar um, hvørji rættindi tær hava. Eitt nú hevur heilsusystir greitt frá, hvussu tær skulu bera seg at, um tær vera fyri hardskapi.

– Eingin skal finna seg í at verða sligin ella misbrúkt av vaksnum, uttan mun um tað er heima ella í skúla. Summar gentur gera greitt, at tær ikki finna seg í at verða illa viðfarnar.

Eldri bólkurin hevur vitjað á politistøðini, har tær hava fingið at vita, hvørjar lógir eru galdandi og hvørji rættindi tær hava, um tær gera lógarbrot og hvørjar avleiðingarnar eru. Eisini í Kvinnuhúsinum hava tær vitjað. Har fingu tær innlit í, hvat hendir við eini familju sum kemur soleiðis fyri, at mamman og børnini mugu rýma úr heiminum. Rúsdrekka- og narkotikaráðið hevur vitjað tvær ferðir. Eitt nú hevur ráðgevin greitt frá, hvussu tað er at halda jól, tá ið onkur vaksin í familjuni drekkur.

– Vit gera nógv saman, baka, gera mat, svimja, bovla ella fara til ymisk tiltøk.

Hóvar ikki øllum

Er Margarinfabrikkin væl umtókt av brúkarunum, eru tað bæði foreldur og lærarar, sum ikki eru so glað fyri, at børn koma har.

– Nógv foreldur vita ikki, at børn teirra koma har. Hesi børnini flippa fullkomiliga út, tá ið tey koma á Margarinfabrikkina, tí tað sleppa tey ikki heima. Tú sært beinanvegin um barnið hvílur í sær sjálvum ella ikki. Og tað eru lærarar, sum halda, at børn skulu ikki koma á Margarinfabrikkina, tí so gera tey ikki skúlating. Men skúlating kunnu tey gera á Margarinfabrikkini.

Tað er óbindandi at koma á Margarinfabrikkina. Her verður tosað um alt, familjur, skúla, frítíð, og mangt annað.

Mynd: Jens Kristian Vang

ítróttur

Nr. 40 • týsdagur • 27. februar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

VÍF hevur møguleikan at taka eitt avgerandi fet móti gullinum, tá tær komandi vikuskifti skulu til Vágs

VÍF-Sóljan 34-14 (21-8)

Toppur og botnur

Eingin ivi var um, hví munurin millum VÍF og Sóljuna hevur verið so stórur hetta kappingarárið, tá liðini hittust leygardagin

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Hóast VÍF nú má vera rumensku Nicoletu Radu fyri uttan, tað sum eftir er av árinum, so var ikki væntandi, at uppflytararnir úr Sóljuni skuldu fara at geva teimum úr Vestmanna nakra serliga mótstøðu, tá liðini hittust leygardagin.

Dysturin skuldi annars verið leiktur hálva aðru viku frammanundan, men varð tá útsettur.

Stórur munur

Tað var heldur ongan tíð líkt til, at nakar spenningur skuldi vera í dystinum leygardagin. VÍF fór beinan vegin at skapa eitt hol upp á nøkur mál, og so við og við bara øktist hesin munur.

Við sigrinum heldur VÍF fast um oddasessin, sum tær hava havt meginpartin av kappingarárinum, men komandi vikuskifti verður talan um eina uppgávu, sum á pappírinum sær nakað torførari út.

Tá gongur leiðin til Vágs, har VB skal royna at gagnnýta setinasta møuleikan at halda so nøkun lunda samband við oddaliðið.

Eisini Sóljan skal tá í holt við nakað, sum líkist einum lagnudyst, tí fríggjadagin skulu tær til Runavíkar, har tær skulu takast við kappingarneytan í botninum. Tjaldur.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
VÍF: Sóley Mikkelsen 12(4), Ioana Rápa 11(3), Nicolina Eyðbjørnsdóttir 4, Jacklin Durhuus 3, Angelina Jógvansdóttir 2, Fríða Marjunardóttir 2
Sóljan: Marjun Jørgensen 8(4), Louisa Jørgensen 1, Elspa Egilstoft 1, Sólja Nielsen 1, Hertha Simonsen 1, Jóhanna í Horni 1, Heidi Haraldsen 1
Brotskøst: VÍF 7, Sóljan 6
Útvísingar: VÍF 2, Sóljan 6
Dómarar úr H71: Petur S. Dahl og Bárður Brimvík.

H71-KÍF 24-34 (13-14)

Kolfirðingar hava sett kósina

Við sigrinum á H71 tók KÍF enn eitt fet úr botninum, og sum gongdin hevur verið, toga teir seg alsamt nærri ovaru hálvu av stigatalvuni. Hoyvíkingar líkjast hinvegin alt meira eini søkkandi skútu

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Lokaluppgerðirnar í høvuðsstaðnum eru í ár vorðnar enn fleiri í tali. Leygardagin var aftur ein av slagnum á skránni, tá H71 átti heimadyst móti KÍF. Higartil í ár hava bæði liðini livað eina tilveru í botninum á stigatalvuni, men seinastu dystirnir hava tó bent á, at kollfirðingar hava ætlanir um at sleppa burtur úr hesum leikluti.

Sostatt hava teir síðani vetrarstegðin fingið trý stig móti Kyndli og Neistanum, meðan teir sum væntað máttu lúta fyri suverena oddaliðnum úr Vestmanna.

Javnt í fyrra

Tað vóru eisini gestirnir, sum byrjaðu dystin leygardagin betri, og longu eftir fáum minuttum tóktist tað, sum um gestirnir veruliga ætlaðu at staðfesta, at tað so avgjørt ikki var av tilvild, at teir hava fingið mongu stigini seinastu dystirnar.

Ikki minst tóktist Iljan Topic at vera væl upplagdur fyrstu løtuna, og við bæði skotum og fríspælingum gjørdi hann sítt til, at gestirnir fingu lagt seg fram um hesa løtuna. Hoyvíkingar royndu í vanliga stílinum at byggja álopsspælið á evnini hjá Halgiri Dahl Olesen, og so við og við komu eisini aðrir hoyvíkingar upp í leikin. Ikki minst hevði Anfinn N. Debes nakrar perlur av standandi skotroyndum, og áðrenn nakar varnaðist, høvdu hoyvíkingarnir brádliga strítt seg upp á liðina av gestunum.

Ikki bert útlendingar

Spælið fyrra hálva tíman var annars í stóran mun rættiliga óskipað. Bæði liðini fóru nógv inn at róta, heldur enn at royna at spæla tunt.

Seinna umfarið var tó skjótt greitt, at kollfirðingarnir høvdu fingið nógv upp á pláss í so máta. Ikki minst í verjupartinum riggaði verjuparturin væl betri enn fyrra umfarið, og sjálvandi viðførdi hetta, at hoyvíkingar í nógv minni mun sluppu fram at skotroyndum.

Nakað annað var so tað, at væl virkandi verjuspælið eisini viðførdi, at kollfirðingarnir í nógv størri mun fingu frið á álopsspælið. Tað var eins og teir nú vistu av, at teir vóru betra liðið, og tí høvdu teir nú nógv størri álit á, at teir bert skuldu koyra egna spæl sítt.

Hetta eydnaðist eisini í stóran mun, og umframt krossini, sum kollfirðingar hava nýtt sera nógv seinastu dystirnar, sýndi serliga Regin Petersen, at hann alt meira gerst ein týdningarmikil liður í álopsspælinum hjá KÍF.

Ikki er tað tí, hann fyllir so nógv við kroppi sínum, men viljin til at stríðast og hondbóltsevni hansara viðførdu, at hann ferð eftir ferð var partur í kombinatiónum, sum endaðu við eini fríspæling inn á strikuna, har hann ótarnaður kundi beina bóltin í málið aftan fyri Egin Høgnesen.

Sum dysturin leið gjørdist tað alt meira greitt, at kollfirðingar skuldu fáa ein greiðan sigur heim aftur við sær. Hoyvíkingar tóktust alt meira mótfalnir, og sum so hava teir eisini orsøk til hetta.

10 tap á rað

Tapið leygardagin var nevnliga tað 10. á rað hjá H71, og í løtuni er ilt at sígga, hvussu teir skulu sleppa undan at enda á niðasta sessinum á stigatalvuni.

Fyri kollfirðingar tykist støðan hinvegin at vera ein heilt onnur. Síðani vetrarsteðgin hevur úrtøkan hjá teimum verið sera góð, og við fullari ferð eru teir ávegis úr botninum, har teir annars hava verið seinnu árini. Tað er ikki bert í úrslitunum síðani steðgin, at hendan útsøgn er grundað, tí eisini spælið hevur bent á, at talan er nógv annað og meira enn eitt botnlið. Heldur enn at leggja dentin á at berjast við mótstøðuliðini, hava kollfirðingarnir lagt dent á systemir, har teir serliga hava spælt upp til útlendingarnar, men sum tað eitt nú var talan um við Regini Petersen, so koma upprunamenninir alt betri og betri við í spælið.

Talan verður tó neyvan um heiðursmerki í ár. Til tess hava teir helst mist dekan ov nógv í grundspælinum, men við verandi gongd, fara teir heilt víst at nærkast ovaru støddu liðunum. Megna teir so eisini at halda fast í verandi hópi til komandi kappingarár kann meira enn so henda, at teir tá fara at verið í stuttliga endanum av røðini.



Ferð eftir ferð eydnaðist kollfirðingum at spæla hoyvíksverjuna tunna, men í hesum føri verður Petur Martin tó blokkaður av Anfinni og Halgir

Mynd: Álvur Haraldsen

Dysturin í tølum:

Málskjúttar:
H71: Halgir Dahl Olesen 12(1), Anfinn N. Debes 5, Hallur Danielsen 3, Olaf Vestergaard 3, Rolf Mouritsen 1
KÍF: Durica Tomic 10(3), Regin PEtersen 7, Iljan Topic 5, Petur Martin Poulsen 3, Petur Martin Johansen 2, Jákup Dam 2, Jónálvur Johannesen 2, Kristian Madsen 2, Eddie Joensen 1
Brotskøst: H71 2, KÍF 3
Útvísingar: H71 5, KÍF 10
Diskvalifikatiónir: KÍF 1 (3X2 minuttir)
Dómarar úr Neistanum: Hjalmar Petersen og Kristian Johansen. Stýrdu uttan stórvegis hóvasták tí, sum fyrifórst á vøllinum.

gult cyan magenta svart